# EFTA/ES/Edmund

JÓGVAN SUNDSTEIN



Týskvøldið 21.10 sá og hoyrdi eg áhugaverda samrøðu í Degi og Viku millum Jørgin Niclasen, varaløgmann og Ingolf Olsen, sjónvarpsmann. Í samrøðuni komu teir víða í umrøðuni av spurninginum um viðurskifti Føroya við Europa og útheimin sum heild. Uttanríkisráðharrin dugdi væl at greiða frá ætlanum sínum og landsstýrisins. Tað, vit eisini fingu at vita, var, at landsstýrið var samt og stóð aftanfyri tær politisku ætlanir hann hevði, og sum han arbeiddi eftir. Men ikki bara tað, sum heild tók meginparturin av Løgtinginum undir við hesum politikki. Hetta seinasta hava vit eisini stórt sæð fingið váttað frá núverandi andstøðuflokkum.

Men so hendir tað , at annar føroyski fólkatingsmaðurin, sum eisini er løgtingsmaður fyri sambandsflokkin, kemur sum ketta úr høvdatrogi, og vil fortelja øllum Føroya fólki, og helst umheiminum eisini, at hann hevur verið ein túr í Brussel og er komin á tal við ein ES kommiser. Hesin hevur greitt honum frá, at ES er áhugað í at fáa Føroyar innlimað í felagsskapin, og at finnast kann helst útav at geva Føroyum sersømdir á fiskivinnuøkinum. Hetta heldur Edmund Joensen vera stórtíðindi, og heldur seg hava loyst allar trupulleikar hjá Føroyum viðvíkjandi marknaðar- og uttanríkispolitikki.

Síðani boðar Edmund Joensen til tíðindafund og fær langa viðtalutíð í Útvarpinum á middegi í dag (23.10). Tíðindini hava ikki nakað serligt nýtt við sær, og tað, sum øll vita, at Edmund gongur inn fyri føroyskum limaskapi í ES sum danskur landslutur, verður endurtikið, men útvarpsjournalisturin heldur óiva hetta vera stórtíðindi. Til alla lukku hevði Útvarpið eisini samrøðu við Jørgin Niclasen, landsstýrismann, og hesin fekk so eina ferð afturat sett tingini uppá pláss. Hann greiddi frá, at hann arbeiddi við ætlanunum um føroyskan limaskap í EFTA (sum ikki er so deyðasjúkt, sum Edmund Joiensen vil vera við), og at hann eisini arbeiddi við betri avtalum við ES viðvíkjandi teim 4 frælsunum v.m. Eisini greiddi hann frá, at hann hevði mandat frá einum samdum landsstýri og eisini frá, í øllum førum meginpartinum av uttanlandsnevndini.

Nú kann ein sjálvandi spyrja, hví gera so nógv burtur úr hesum. Tað hevur heldur ikki so stóran týdning í sær sjálvum, at Edmund Joensen spælir sær við nøkrum vitjanum í Europasamveldinum, men tað, sum kann fáa keðiligar avleiðingar fyri Føroyar, er at Sambandsflokkurin, sum hevur løgmann í núverandi landsstýri, leggur navn til ein slíkan egotíðindafund hjá Edmundi Joensen, har hesin beinleiðis leggur eftir núverandi politikki landsstýrisins og løgtingsmeirilutans. Hetta kann skapa órógv í landsstýrissamarbeiðinum, og kann eisini í ringasta føri skapa misljóð úteftir.

Kaj Leo Johannesen, løgmaður, eigur tí at vera sera varin. Um hann tekur undir við Edmund Joensen, sjálvt um tað er óbeinleiðis, so fær hann stórar trupulleikar við at fáa landsstýrisins politkk ígjøgnum. Hann má heilt greitt geva útmelding um, at tað, sum Edmund Joensen ger, er eitt "egotripp", og at hann tekur undir við politikkinum, soleiðis sum Jørgin Niclasen hevur formulerað hann. Um hann ikki fæst at gera tað, men bakkar Edmund Joensen upp, so fær hann líka so stórar trupulleikar í hesi samgongu, sum vit sóu teir høvdu í seinastu samgongu. Tað má vera heilt greitt, at tað er landsstýrið, sum hevur samráðingarheimildir og ikki ein tilvildarligur fólkatingslimur.

Míni ráð til Jørgin Niclasen eru annars: Lat teg ikki ávirka av Edmundi Joensen.

# Svimjihylurin á Skúlanum á Trøðni

OYVINDUR BRIMNES
stjóri á Landsverki



Málið um umvælingina av svimjihylinum á Skúlanum á Trøðni hevur fingið nógva umrøðu í fjølmiðlunum. Hetta hevur eisini verið óvanliga drúgført arbeiði, og einki løgi er í, at funnist verður at myndugleikum og politikarum, tá ið tað tekur fleiri ár at umvæla ein lítlan almennan svimjihyl, sum hevur so stóran týdning fyri nøkur børn, sum frammanundan hava tað ivaleysa trupult.

Onkur politikari hevur havt hug at gera Landsverk til tann stóra skálkin í søguni og hevur tilluta stovninum tann ivasama heiður at eiga heimsmetið í dráli.

Rætt er tað, at Landsverk varðar av almennum byggiuppgávum og hevur tað ítøkiliga málið um hendi. Eisini er tað rætt, at hetta málið hevur ikki gingið, sum vit høvdu ætlað, og tað harmast vit um.

Tá tað er sagt, er eisini neyðugt at sláa fast, at í hesum føri hevur verið talan um eina røð av óhepnum umstøðum, sum Landsverk stórtsæð ikki hevur verið harri yvir. Umstøður, sum eg fegin vil lýsa her, so at almenningurin fær eina meira fullfíggjaða og rætta mynd av málinum.

**Trupulleikin sum vaks**

Tað er ikki rætt, soleiðis sum onkur kundi fingið fatan av, at Landsverk hevur ligið omaná svimjihylinum á Skúlanum á Trøðni í fimm ár.

Tað var í februar 2005, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan avgjørdi at steingja svimjihylin, tí reinsiverkið virkaði ikki, sum tað skuldi. Sernámsdepilin setti seg í samband við privatar ráðgevarar, sum komu við eini loysn.

Landsverk kom inn í myndina við árslok 2005. Sostatt eru tað ikki fimm, men sløk trý ár síðani, at Landsverk fyrstu ferð hoyrdi um hetta mál.

Privatu ráðgevararnir høvdu gjørt forkanningar. Hesar forkanningar arbeiddi Landsverk víðari við saman við ráðgevunum, men tað skuldi seinni vísa seg, at forkanningarnar vóru ikki nøktandi. Trupulleikarnir vóru nógv størri, enn teir privatu ráðgevararnir høvdu mett.

**Fíggjarlig óvissa**

Hetta málið lýsir eisini ógvuliga væl, hvussu tann almenna játtanarskipanin kann leggja fótonglar fyri arbeiðið hjá Landsverki.

Talan er um ein almennan stovn, sum arbeiðir við verkætlanum, ið røkka tvørturum fleiri fíggjarár, meðan almennu játtanirnar bert eru fyri eitt ár í senn. Tí má stovnurin ofta stríðast frá túgvu til túgvu fyri at fáa tann neyðuga peningin til vega. Tað merkir, at tað kann vera trupult at leggja verkætlanir til rættis líka frá byrjan til enda. Hetta vandamálið hevur Landsverk gjørt vart við fleiri ferðir.

Tá stovnurin fekk málið um svimjihylin á Skúlanum á Trøðni upp í hendur um ársskiftið 2005-06, vóru eingir pengar tøkir til endamálið. Uttan játtan bar ikki til at gera nakað, og tí lá alt stilt eina tíð. Veturin 2006/2007 – stívliga eitt ár eftir, at Landsverk hevði fingið uppgávuna – eydnaðist loksins stovninum at finna eina loysn. Peningurin varð útvegaður við at umleggja játtanina frá Mentamálaráðnum til viðlíkahald. Nú skuldi verið klárt at farið til verka.

**Eingin arbeiðsmegi**

Fyrst í 2007 byrjaði eisini arbeiðið. Men longu í februar kemur so undan kavi, at trupulleikarnir eru nógv størri, enn privatu ráðgevararnir høvdu mett í 2005. Tað vísti seg, at trupulleikar vóru ikki bert við reinsiverkinum, men eisini lak botnurin í svimjihylinum. Arbeiðið var sostatt nógv meira umfatandi, enn upprunaliga mett. Ráðgevarin mátti nú, saman við Landsverki, endurskoða ætlanina, og ein onnur loysn varð funnin.

Men í 2007 er snøgt sagt ógjørligt at fáa handverkarar til uppgávuna. Meðan Landsverk arbeiðir við at endurskoða ætlanina, eru fleiri av handverkarunun farnir til aðrar uppgávur, sum hava ligið og bíðað, og tað er trupult at finna aðrar. Sum dømi um, hvussu trupul støðan var, kann nevnast, at í februar 2007 fór múrarin frá arbeiðinum, og ikki fyrr enn í februar 2008 – eitt heilt ár seinni – eydnaðist at fáa ein annan múrara.

**Liðugt í januar**

Sum sagt harmast Landsverk um tað drúgvu gongd, sum verið hevur við svimjihylinum á Skúlanum á Trøðni. Kortini mugu vit staðiliga avvísa, at drál, seinføri ella vantandi virkisføri hava verið atvoldin, men hevur høvuðsorsøkin verið ein samanrenning av fleiri óhepnum umstøðum, sum vit ikki hava fingið gjørt nakað við.

Gongst sum ætlað, sleppa børnini aftur í hylin í januar. Tað gleðir okkum. Tað góða við hesi alt ov drúgvu søgu er so hinvegin, at vit fáa eina betri loysn. M.a. fara 8 dysir í botninum at tryggja eitt sera gott vatnútskiftið í hylinum. Botnurin er eisini bjálvaður, so at hann heldur hitanum betri, og tað átti at spart um oljurokningina.

Og so fer í hvussu so er eitt at halda. Svimjihylurin fer at kosta 1,2 milliónir krónur - júst sum upprunametingin segði.

# 80 km/tíman er mest loyvda ferð í Føroyum

JONNA JUSTINUSSEN

Í morgunsendingini í útvarpinum var tosa um ferðina á vegunum í Føroyum. Tað kundi ljóðað sum, at tú SKULDI koyra 80 km/t har tað var loyvt, og at um tú ikki gjørdi tað, so koyrdi tú ov seint og tarnaði ferðsluni, og av tí sama vart tú orsøk til svakar yvirhálingar og vandamiklar situatiónir...

"Rasarin" heldur, at hann eigur vegin og eigur at sleppa at koyra sum hann vil. Merkiligt nokk, sigur "snigilin" akkurát tað sama, heldur uppá sítt og koyrir mitt á vegnum. "Eg havi eisini goldið mín vegskatt", hugsar hann. Og mín sann um tað ikki eisini eru nøkur djór, seyður, harur og fuglar, sum vilja halda uppá, at vegurin er teirra.

Spurningurin er so, hvussu fáa vit hesi tingini at hanga saman? Tí vegin eiga vit øll, bæði fólk og djór. Fólk, tí tey vilja koma úr einum stað í annað, og djórini, tí vegurin liggur í náttúruni, har tey ferðast.

Tað er bert eitt at gera, nevniliga at koyra eftir umstøðunum og minnast til, at *80 km/t er mest loyvda ferð í Føroyum.* Tíbetur gera tey flestu tað, tey koyra hampuliga, laga seg eftir hinum, so vit koma fram í øllum góðum.

Tú kanst bert koyra 80 km/t ella meira, tá ongin er á vegnum fyri framman, tá tað er ljóst, tá útsýnið er frítt til allar síður og onki djór er í nánd, og vegurin er turrur. So einkult er tað. Allarhelst eisini, at tú ert einsamallur í bilinum, er væl fyri og ikki tosar í fartelefon.

"Snigilin" skal hyggja í bakspegilið hjá sær, og hann skal fara til viks og lata hinar sleppa framvið, tá ein hali av bilum troðkar aftanfyri. Hetta átti hvør koyrilærari at lært sínar næmingar. Summa tíðir hevur ein bara ikki hug at koyra skjótt, og tá ein ikki hevur skund, hví so ikki flyta seg fyri hinum?

"Rasarin" skal sláa kalt vatn í blóðið, sleppa speedaranum og leggja seg eftir at spara benzin ístaðin. Hann skal fara tíðliga upp og fara heimanifrá minst 10 minuttir fyrr enn hann plagar.

Djórini? Tey fara framvegis at liggja deyð ella illa løstað á vegnum, um vit menniskju ikki geva teimum gætur og seta ferðina niður, tá vit nærkast teimum.